# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 01.05.2017*

**Bygdaráðsfundur: 01.05.2017 kl. 18.00 til kl. 18.15**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd:** | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 36/2017 Tilbúgvingarvirksemið**

J.nr. 14.00.00-Ø09-1-16

**Málslýsing**

Ársroknskapurin fyri 2016 hjá Skálafjarðar Sløkkiliði er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

| | **R 2016** | **R 2015** |
|---|---|---|
| **Inntøkur:** | | |
| Nettoinntøkur | 1.897.567 | 1.905.798 |
| Útreiðslur íalt | 1.763.745 | 1.565.038 |
| **Ùrslit áðrenn avskriving/rentur** | **133.821** | **340.760** |
| | | |
| Avskrivingar | 194.537 | 232.639 |
| Rentur | 3.755 | 4.146 |
| **Ársúrslit** | **-56.960** | **112.267** |

**Tilmæli**

Á fundi 26.04.2017 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við ársroknskapinum fyri 2016, hjá Skálafjarðar Sløkkilið, soleiðis sum hann er uppsettur.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 37/2017 Fyrisitingarligar skipanir**

J.nr. 85.00.00-G01-1-16

**Málslýsing**

Nes kommuna hevur biðið um uppskot og tilboð uppá nýggja heimasíðu til kommununa.

Biðið varð um tilboð frá 3 veitarum, Krea, Beak og Faroe Media.

Tá freisin var úti, vóru tilboð komin frá øllum 3 veitarunum, og havi allir verið og lagt teirra uppskot fram fyri fíggjarnevndini.

**Tilmæli**
Á fundi 26.04.2017 mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilboðum frá Krea, grundað á eina samlaða meting av prísi, dygd og tænastu.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 38/2017 Bókasavnsvirksemið**
J.nr. 21.00.00-Ø09-1-17
**Málslýsing**
Fíggjarætlanin fyri 2018, hjá Bókasavninum í Nes kommunu, er komin til ummælis.

**Tilmæli**
Á fundi 26.04.2017 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við Fíggjarætlanini fyri 2018, hjá Bókasavninum í Nes kommunu, soleiðis sum hon er uppsett.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 39/2017 Ognir og hølir**
J.nr. 82.01.00-G01-2-15
**Málslýsing**
Tekniska deild hevur innheintað tilboð uppá niðurtøku av sethúsunum á matr. nr. 429 Tofta bygd.

Biðið varð um tilboð frá 2 veitarum. Tá freistin var úti 24.04.2017 var eitt tilboð komið inn, og er tað frá Falkon Entreprenørar.

**Tilmæli**
Á fundi 26.04.2017 mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilboðnum frá Falkon Entreprenørar.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 01.05.2017*

**Mál nr. 40/2017 Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.22.04 – Ø54-1-17
**Málslýsing**
Nýtt uppskot er gjørt til samstarvsavtalu millum Sjóvar-, Nes- og Runavíkar kommunur, galdandi frá 01. mai 2017.

**Tilmælir**
Á fundi 20.04.2017 mælir Trivnaðarnevndin til, at taka undir við fyriliggjandi avtalu við tí broyting:

- at 2. reglubrot í grein 5 verður flutt undir grein 4, sum síðsta reglubrot

Á fundi 26.04.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.